# Skræddaraseymað til suðuroyingar



*Her fæst ein hóming av, hvussu skipið sær út innan. Á øðrum ferðafólkadekkinum er salong til 130 fólk, kafé til 200 fólk, spælirúm, tvey fundarhøli, teldurúm. viðførisrúm, gangur, wc, rúm til spælimaskinur o.s.fr.*

**Nýggja suðuroyarferjan, sum eftir ætlan verður liðug í 2004, er skræddaraseymað til suðuroyingar og tað fer at lúka krøvini langt fram í tíðina**

STRANDFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*

Nýggja ferjan, sum ætlanin er at byggja til suðuroyarsiglingina fyri Smyril, er eitt skip, sum er skræddaraseymað til suðuroyingar.

Tað fingu løgtingslimir, landsstýrislimir og tíðindafólk at vita á einum kunnandi fundi um skipið seinnapartin mikudagin.

Ætlanin at byggja nýtt suðuroyarskip er nú komin so mikið áleiðis, at tíðin var komin hjá Strandferðsluni og Vinnumálastýrinum at kunna játtandi myndugleikarnar, Løgtingið, umframt Landsstýrið og tíðindfólk um skipið.

Tað hendi á fundi á Hotel Hafnia seinnapartin mikudagin.

Men teir suðuroyingarnir, sum skuldu við á fundin, máttu flúgva norður við tyrluni, tí Smyril hevði aftur fingið tekniskt brek sum eina áminning um, at nýggja skipið verður bygt, ongantíð ov skjótt......

## Stásiligt skip

Tað skerst ikki burtur, at tað var eitt stásiligt skip, sum Johannus Johannesson, projektleiðarin, hjá Knud E. Hansen hevði at leggja fram.

Hann duldi ikki fyri, at tað hevði verið ein stór avbjóðing fyri Knud E Hansen at projekterað hesa nýggju suðuroyarferjuna, tí hetta er eitt skip, sum er skræddaraseymað til tað farleið, hon skal sigla.

Hann segði, at uppgávan, sum teir høvdu fingið frá Strandferðsluni, var at gera eina ferju, sum kundi sigla fýra ferðir hvønn veg ímillum Suðuroynna og Havnina um samdøgurið og til tað kravdust eitt skip, sum sigldi minst 21 míl.

Skipið skuldi brúka 1,5 tíma um hvønn túr og tað skuldi bera til at tøma skipið og fylla tað aftur upp á ein hálvan tíma.

Harumframt varð kravt, at skipið varð trygt og sjógott, at tað lýkur øll framtíðar krøv, at brekað hava góðar umstøður umborð og at tað er bíligt í rakstri.

Reidar Nónfjall sigur, at hvat ferðafólkum viðvíkur, er Smyril, sum nú er, nóg stórur, tí hann tekur 800 ferðafólk.

Men tað er serliga hvat bilað og farmaflutningi viðvíkur, at hann er alt ov lítil.

– Flutningurin av bilum er vaksin øgiligt, seinastu árini, eins og flutningur av treylarum og øðrum farmi.

Hann vísti á, at hetta hevur ført við sær, at tað er ein dagligur trupulleiki nú, at Smyril er ov lítil og at ikki allir bilar sleppa við.

Burturúr hesum, hevur projekteringsfelagið Knud E. Hansen í Danmark roknað seg fram til, at akkurát hetta skipið er tað rætta.

Tað er sjálvsagt mest á biladekkinum, at tann nýggja suðuroyarferjan er væl størri og betri útgjørd enn Smyril, sum nú er.

Men tað skerst heldur ikki burtur, at eisini hjá ferðafólkunum verða umstøðurnar so nógv betri, at tað tolir ongar samanberingar við umstøðurnar umborð á Smyrli, sum nú er.

Smyril tekur 110 bilar. Nýggja Suðuroyarferjan tekur 200 bilar.
Biladekkið er eisini sostatt eisini bæði breiðari og hægri enn á á Smyrli, sum nú er. Á nýggja Smyrli verða 60 sentimetrar ímillum hvørt raðið av bilum, so gott pláss er at ganga.
Harafturat er gongurbreyt uppá 90 sentimetrar í hvørjum borði, so at fólk sleppa undan at ganga ímillum bilarnar. Upp av biladekkinum sleppa fólk ígjøgnum keysingina, sum gongur mitt ígjøgnum skipið.

Nýggja ferjan er 22,7 metrar breið. Hon hevur onki portur framman, men tvey hekkuportur uppá átta metrar hvørt. Sostatt er hvørt portur væl breiðari enn tað á Smyrli.

Orsøkin til, at nýggja ferjan onki portur hevur framman, er, at tað er bygt sum eitt havgangandi skip við ronkum forskipið sum ger at tað brýtur seg ígjøgnum aldurnar og tískil er nógv róligari í sjonum.

Men longdin og breiddin á nýggja Smyrli gera so eisini, at bilar kunnu koyra umborð ígjøgnum annað hekkuportið, samstundis sum bilar koyra íland ígjøgnum hitt.

Tá ið bilar og treylarar skulu umborð, koyra teir umborð í stýriborð, heilt fram í skipið, har teir snara og koyra so afturígjøgnum skipið í bakborði. Fyri at tað skal vera pláss hjá treylarum at venda, uttan at noyðast at bakka, krevst at skipiðå er so breitt, sum tað er.
Hetta er fyri, at tað skal ganga skjótt at fylla og tøma skipið.
– Skipið skal vera ein “effektiv trafikkmaskina”, sum Strandferðslan sigur.
Fyri at gera tað so trygt sum gjørligt, hevur nýgga suðuroyarferjan tvey av næstan øllum, eitt nú tvey róður, tvær skrúvur og tvey hekkuportur - tí sum suðuroyingar óivað vita nú, kann eitt portur altíð blíva í ólagi..... Men hon hevur fýra motorar.

Tolir onga samanbering
Eisini ferðafólkið fer sanniliga eisini at merkja eitt stórt framstig.
Á einum ferðafólkadekki er kafé til 200 fólk, kiosk, upplýsing o.s.fr, salong til 130 fólk og sóldekk. Á einum øðrum ferðafólkadekki er kafeteria til 400 fólk, spælipláss til børnini, maststova til 60 fólk og sóldekk
Harafturat eru koyggjur til 100 fólk.
Somuleiðis kann nevnast, at Nýggja suðuroyarferjan hevur serligt rúm til líkkistur, hon hevur sjúkrakamar, har lyfta gongur beinleiðis av biladekkinum upp á sjúkrakamari ð og víðari beint upp á tyrlupall, um tað skuldi gjørt neyðugt, tí tað hevur nýggja ferjan eisini.
Hon hevur eisini fundarhøli og arbeiðsrúm, har fólk kunnu sita í friði og náðum, spælirúm til børn, rúm til viðføri og rúm til spælimaskinur.
Fyri at skipið ikki skal virka alt ov tómligt, tá ið fá fólk eru við, ber tað til at skila teir ymsu partarnar í skipunum av, so at onkrar salengur verða stongdar, tá ið fólkið ikki er so nógv.



*Við nýmótans teldutøkni ber til at gera eina mynd av, hvussu skipið fer at síggja út. Her sæst, hvussu tað sær út eitt sindur úr erva. og m.a. sæst, at tað hevur tyrlupall. Skipið er 135 metrar langt, bygt sum eitt havgangandi skip við ronkum forskipið, sum ger, at tað sker seg ígjøgnum aldurna. Tað er við til at gera tað sera sjógott. At tað stingur ein metur djúpri enn Smyril, sum nú er, er eisini fyri at gera tað sjógott og sjálvandi hevur tað stabilisatorar*





*Soleiðis sær ovara ferðafólkadekkið út. Har er kafeteria til 400 fólk, matstova til 60 fólk og spælipláss til børn*

# Nýggi Smyril liðugur um trý ár

**Næsta ár verður kjølurin strektur og í 2004 er skipið liðugt**

STRANDFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*

Um trý ár fáa suðuroyingar, og allir aðrir føroyingar ein spildurnýggjan Smyril at sigla við.

Á kunnandi fundinum um nýggju suðuroyarferjuna mikudagin, fekst at vita, at nýggja suðuroyarskipið verður liðugt í 2004.

Ætlanin er at brúka árið í ár til at fyrireika byggingina og næsta ár verður kjølurin bygdur. Síðani tekur tað gott tvey ár at byggja skipið.

Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni, sigur, at felagið Knud E. Hansen, sum hevur projekterað skipið, hevur givið Strandferðsluni eitt yvirlit yvir 20 skipasmiðjur um allan heimin, sum felagið heldur eru førar fyri at byggja skipið við teimum dygdarkrøvum, sum sett verða.

Síðani verður tilfar sent hesum skipasmiðjunum við fyrispurningi um, hvat skipið kann byggjast fyri og um áhugi er fyri at byggja tað yvirhøvur.

Tá ið tað tilfarið er innkomið, verða nakrar fáar pilkaðar burturúr, tær sum ljóða mest áhugaverdar og so verður samráðst víðari við tær. At enda verður so sáttmáli gjørdur við ta einu skipasmiðjuna, sum so byggir skipið.

Nýggi Smyril er 135 metrar langur, 22,7 metrar breiður og hann stingur 5,60 metrar. Hann siglur 21 míl, tekur 800 fólk um veturin og 976 um summarið, og hann tekur 200 bilar.

Til samanberingar kann nevnast, at Smyril, sum nú er, er 92,7 metrar langur, 16,52 metrar breiður, stingur 4,65 metrar, siglur 16,5 míl, tekur 800 ferðafólk og 110 bilar.

Nýggja Skipið er mett at kosta 305 milliónir at byggja.

Nýggja skipið er sostatt eitt munandi framstig, men Strandferðslan heldur, at tað er neyðugt, tí nú er tað næstan dagligur kostur, at bilar standa eftir, tí Smyril er fullur.

Hóast hetta skipið er nógv størri enn Smyril, sum nú er, er hann heldur bíligari í rakstri, tí hann brúkar tungolju.





# Nýggjur skeiðdepil

**Skúlastjórnarnir halda báðir, at nógvir fyrimunir eru við eini samanlegging av skeiðtænastunum hjá Tekniska Skúla og Handilsskúlanum**

SAMANLEGGING
*Jákup Mørk*

Hvat hava ein handverkari og ein skrivstovumaður til felags? Kanska ikki so heilt nógv, vilja fleiri vera við, men millum hesi teljast so ikki skúlastjórarnir á Handilsskúlanum og Tekniska Skúla.

## Samanlegging

Teir báðir skúlarnir hava longu í fleiri ár hjavt hvør sína skeiðtænastu, har av serliga tann hjá Handilsskúlanum hevur verið skipað, meðan tann hjá Tekniska Skúla í nógvar mátar hevur verið skipað eftir tørvi. Millum annað hevur Tekniski skúli havt skeið í nýggjari tøkni innan ymsu handverksgreinarnar.

Handilsskúlin hevur hinvegin, síðani skeiðtænastan byrjaði í 1987, lagt seg meira eftir skrivstovuyrkinum. At byrja við einamest innan teldunýtslu, men so við og við eru onnur skeið komin afturat, og fevnir skeiðtænasta teirra í dag um hópin av skeiðum innan fyrisiting, mál, persónliga menning o.s.fr.

Nú er so gjørt av, at skeiðtænasturnar skulu leggjast saman.

Í tíðindaskrivi verður sagt, at orsøkirnar til samanleggingina sjálvandi eru fleiri, men at tær avbjóðingar, sum ein møgulig oljuvinna fer at geva, so avgjørt hevur skumpað undir.

Eisini verður í tíðindaskrivinum sagt, at tað umsitingarliga gerst nógv bíligari, nú skeiðtænastan verður rikin í felag.

## Raka fleiri brúkarar

Umframt teir fyrimunir, sum eru nevndir í tíðindaskrivinum, so er tað serliga ein annar fyrimunur, sum teir báðir stjórarnir leggja dent á, tá vit mikudagin fingu orðið á teir.

– Við tað at báðir skúlarnir eru vinnuskúlar, hava vit kanska á ein hátt ligið í kapping við hvønn annan um ávísar málbólkar, men fyri ikki at stjala viðskiftafólk frá hvørjum øðrum, hava skeiðstilboðini ofta verið avmarkað, soleiðis at vit ikki hava flutt okkum inn á yrkisøkið hjá hvørjum øðrum. Hetta hevur heilt víst viðført, at summi møgulig viðskiftafólk eru sett millum tveir stóla, tí ein »grá zona« hevur verið ímillum okkum. Við eini felags skeiðtænastu verður málbólkurin nógv breiðari, ella tú kanst siga, at kontaktflatan hjá okkum gerst størri, sigur Egon Øregaard, og stjórin á Handilsskúlanum er heldur ikki ósamdur í hesum.

– Tað spælir heilt víst inn, at kontaktflatan hjá okkum við hesum verður størri, heldur Ragnar Magnussen.

Víðari sigur hann, at hann ivast heldur ikki í, at hetta eisini fer at styrkja báðar skeiðtænasturnar.

– Bara tað, at vit eru saman, ger vit standa okkum nógv sterkari í kappingini, men fíggjarliga eru so avgjørt eisini stórir fyrimunir.

– Tá lærarar skulu útbúgvast víðari, sleppa vit undan at gera hetta hvør í sínum lagi, tí í fleiri førum hevur verið talan um at kalla eins lærugreinar, innan ymsu skeiðini. Eisini viðvíkjandi hølisviðurskiftum er tað ein stórur fyrimunur, tí vit kunnu gerast meira fleksibul, tá fleiri høli eru at velja ímillum.

Annars er meira at lesa um skeiðdepilin í faldaranum, sum júst er útkomin. Har umframt ber eisini til at fara á alnetið á http:/sth.olivant.fo. Hendan síðan verður ætlandi broytt nakað skjótt til sdm.fo.

## Verður kanska størri

Sum vit sita her úti í Marknagili, har stjórarnir báðir eru grannar, slepst heldur ikki undan, at prátið fellur inn á ein møguligan skúladepil, sum eftir skal liggja í Marknagili við Handilsskúla, Tekniskum Skúla og Studentarskúla.

Spurdir, um hetta samstarvið millum skúlararnar kann hugsast at vaksa, um talan verður um ein skúladepil, vilja teir báðir ikki gera ov stórar staðfestingar, men hinvegin halda teir, at hetta avgjørt kundi styrkt um skúlarnar.

– Tað er ein sannroynd, at við tíðini gerast førleikakrøvini innan ymsu vinnugreinarnar alsamt størri, og tí eigur eitt samstarv í nógvar mátar at vera gagnligt.

– Tað verður helst eisini neyðugt við samstarvi í einum møguligum skúladepli. Vit hava jú ikki tær stóru eindirnar í Føroyum, og fyrisitngarliga vil slikt samstarv altíð verða ein fyrimunur. Bara í Danmark hevur tú skúlar við fleiri túsund næmingum, og ein møguligur skúladepil fer kanska um fevna um einar túsund, so hóast ein slíkur depil ljóðar ógvusligur, so er tað kortini ikki so, sigur Egon Øregaard at enda.



*Ragnar Magnussen og Egon Øregaard eru ikki í íva um, at samanleggingin av skeiðtænastunum hevur nógvar fyrimunir við sær*

*Mynd: Álvur Haraldsen*